# Fjarlestur til yngri og eldri

**Yngri sum eldri fólk í Føroyum kring alt landið fáa nú at møguleikan at taka eina útbúgving sum fjarlesandi á lærdum háskúla í Aberdeen. Eftir trý ár og 10-12 tímum um vikuna, kanst tú kalla teg master í leiðslu og fyrisiting. Útbúgvingingarmøguleikin er úrslit av samstarvið millum BP, Føroya Handilsskúla og Robert Gordon University í Aberdeen**

ÚTBÚGVING
*Heri á Rógvi*



*Elsa Maria Holm Olsen, deildarstjóri á Føroya Handilsskúla, Stjórin fyri Føroya Handilsskúla, Ragnar Magnussen, og Hjarnar Djurhuus frá BP hava góðar vónir um hetta nýggja útbúgvingar tilboðið, ið tey skipað fyri í felag við lærdum háskúla í Skotlandi*
*Mynd: Jens Kristina Vang*

Handilsmaðurin í Svínoy, húsmóðurin í Nólsoy og seyðamaðurin suðuri í Sumba hava nú, eins og restin av føroyingum, møguleika at taka eina útbúgving á lærdum háskúla í Aberdeen, uttan at fara útum dyrnar.

Tað einasta, sum krevst, er: Universitetsútbúgving ella tilsvarandi útbúgving, útbúgving frá øðrum góðkendum lærustovni, eitt nú lærari ella hægri handilsskúli ella viðkomandi yrkis-, handils- ella aðra førleikagevandi arbeiðsroyndir á einum stigi, ið heimilar fráviki frá vanligu upptøkukrøvunum.

Ella sagt við øðrum orðum: Ein ógvuliga stórur partur av føroyska vinnulívinum og arbeiðsføraskaranum hevur møguleikan at søkja og sleppa inn.

### Fjarundirvísing

Í fyrstu atløgu verða 20 føroyingar tiknir upp og eftir trý kunnu hesir, um teir eru áhaldnir og gera tað sum krevst, kalla seg fyri master í leiðslu og fyrisiting.

Útbúgvingin er løgd til rættis sum parttíðarundirvísing við fjarlestri. Talan er sum sagt um eina master útbúgving í virkisleiðslu við heitinum Management Studies Course.

Útbúgvingin er á einari deild á Robert Gordon University í Aberdeen, ið kallast fyri Univation. Hetta er ein deild, ið skipar fyri fjarlestri um allan heim, og nú eru túrurin eisini komin til Føroya.

Tey lesandi í Føroyum fáa alt tilfarið sendandi, og við stuðilinum frá BP, so kemur tað ikki at kosta nøkrum nakað at taka útbúgvingina.

Í Føroyum verður tað Føroya Handilsskúli, sum kemur at hjálpa teimum lesandi við ymiskum.

Talan er um eina viðurkenda útbúgving á lærdum háskúla í Aberdeen, sum føroyingar ókeypis fáa møguleikan at taka eina útbúgving. Tá talan er um lærdan háskúla, so merkir hetta eisini, at talan er um eitt høgt støði. Tað verður mett, at tey lesandi skulu nýta einar 10-12 tímar um vikuna fyri at fylgja undirvísingini og klára prógvtøkurnar. Tað er sostatt tey lesandi sjálvi, ið leggja sín lestur til rættis.

Tær prógvtøkur, ið vera fyri tey lesandi, vera allir skrivligar. Undirvísingin er skipað soleiðis, at tey lesandi taka eitt skeið við einari lærugrein í senn. Tá ið ein lærugrein er liðug, so verður farið til prógvtøku. Tilsamans eru átta lærugreinir; fýra á hvørjum av teimum fyrstu tveimum árunum. Triðja árið verður nýtt til eina høvuðsritgerð. Prógvtøkurnar verða allar fyriskipaðar á Føroya Handilsskúla og, eins og undirvísingartilfari, verða hesar eisini á enskum máli. Næmingar verða innskrivaðir á Virtual Cambus hjá Robert Gordon University og ígjøgnum hesa skipan verður eisini møguligt at koma í samband við vegleiðara í Aberdeen. Umframt verður tað eisini skipað fyri skeiðum á Føroya Handilsskúla, har tey lesandi kunnu samskifta við hvønn annan og ein lærara. Hesar dagarnar verða lagdir við byrjanina og endan av einum skeiði.

### Samstarv

Sum partur av loyvinum hjá BP í Føroyum, so hevur felagið eisini bundið sig til at stuðlað føroyska samfelagnum við førleika menning og øðrum í sambandi við kollvetnistilgongdina.

Hjarnar Djurhuus, stjóri fyri BP í Føroyum, sigur, at BP hevur lagt stóran dent á at stuðla útbúgving og venjing, sum byggir á handilsliga og tøkniliga vitan og kunnleika.

Hann metir harumframt hetta vera at gott at høvi at stuðla, tí hetta gevur møguleikar hjá øllum at útbúgva seg, uttan mun til, hvar í landinum tú býrt. Eisini tey, sum kanska ikki hava møguleikan at ganga til undirvísing til ávísar tíðir, hava nú møguleikan at fáa eina góða útbúgving.

Hjarnar sigur harumframt, at BP vónar ein tílík útbúgving fer at gera sítt til at økja um áhugaverdar og lønandi starvsmøguleikar hjá fólki, ið annars ikki hevði havt høvi at tikið lut í hægri lestri.

Elsa Maria Holm Olsen, deildarstjóri á Føroya Handilsskúla, sigur, at uppgáva Føroya Handilsskúla verður at tryggja, at tey lesandi fáa so góðar umstøður at lesa fjarlestur í sum gjørligt. Føroya Handilsskúli verður binandi liðurin millum tey lesandi og Robert Gordon University.

Stjórin fyri Føroya Handilsskúla, Ragnar Magnussen, sigur harumframt, at hetta hóskar væl saman við teimum ætlanum, sum Føroya Handilsskúli hevur sett sær. Ætlanin er nevniliga, at innanfyri eitt ávíst áramál, skal Føroya Handilsskúli kunna bjóða útbúgvingar á bachelor (BS) stigi.

Lýsingar verða setta í bløðini í næstum, har søkt verður eftir umsóknum. Sjálv útbúgvingin byrjar 4. mars. Skipað verður fyri kunnandi fundi áðrenn, fyri øllum teimum, ið hava áhuga.

# Evnisdagur um økismenning



*Heilt fitt av fólki var á evnisdegnum um ferðavinnu og økismenning í Norðurlandahúsinum*
*mynd: Jens Kristian Vang*

Allan dagin í gjár (mikudagin) vóru fólk í ferðavinnuni í Føroyum á evnisdegi í Norðurlandahúsinum. Heitið á evnisdegnum var ferðavinna og økismenning. Luttøkan var eisini rímiliga góð, og fleiri fyrilestrar vóru eisini á skránni. Millum helt Bergur Olsen, fuglafrøðingur fyrilestur um burðadygga ferðavinnu og fuglalív. Tórálvur Weihe tosaði eisini um skelting.

Eisin útlendskir gestir úr Hetlandi og Danmark vóru við á evnisdegnum.

Evnisdagurin endaði við einum panelfundi. Tað eru Ferðaráð Føroya og Vinnumálastýrið sum í felag skipa fyri degnum.

Lesið meira um evnisdagin í Sosialinum í morgin.



*Her skrivað Ragnar Magnussen og Hjarnar Djurhuus undir upp á samstarvsavtaluna teirra millum.*



# Tingmenn skulu bara hava eina løn

**Fleiri ferðir hetta valskeiðið er tað hent, at landsstýrisfólk hava lagt frá sær og tikið sæti aftur á tingi. Tey hava tá fingið bæði landsstýris- og løgtingsløn. Hetta skal ikki bera til longur**

POLITIKARALØNIR
*Eirikur Lindenskov*



*Enn einaferð skulu tingmenn viðgera lønarviðurskiftini hjá landsstýrismonnum. Hesaferð er tað Alfred Olsen úr Sambandsflokkinum, sum skjýtur upp, at tá landsstýrismaður tekur sæti aftur á tingi, skal hann ikki fáa dupulta løn í hálvt ár…*

– Tað kann ikki vera rætt, at føroyski skattaborgarin skal gjalda sama persóni fulla løgtings- og landsstýrismannaløn.

Tað heldur Alfred Olsen, løgtingsmaður Sambandsfloksins, sum hevur skotið upp at broyta lóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna. Løgtingið fer á fundi í dag at viðgera uppskotið.

Í viðmerkingunum til uppskotið vísir Alfred Olsen á, at tað fleiri ferðir eru farnar fram útskiftingar í landsstýrinum hetta valskeiðið, og at løgtingið hevur verið noytt at játta pening á eykafíggjarlógum fyri at gjalda hesar dupultlønir, tí landsstýrismaður, sum fer frá, hevur rætt til løn í hálvt ár, samstundis sum hann – um hann er valdur tingmaður og tekur aftur sæti á tingi – eisini hevur rætt til fulla tingmannaløn.

Við hesi grundgeving skjýtur sambandstingmaðurin upp at broyta lógina.

Annars varð henda lógarbroyting framd, tá løgtingið í mai í fjør samtykti broytingar í lóg um løn og samsýning landsstýrismanna. Men av tí mikla rumbli, sum stóðst av málinum, bakkaði løgtingið og tók av aftur lógina, áðrenn hon átti at koma í gildi, 1. januar í ár.

Tískil varð bakkað aftur til lógina, sum varð samtykt í 1992 og lýst at koma í gildi 8. januar 1993.







*Signar á Brúnni, Finnbogi Arge og Helena Dam á Neystabø hava fingið landsstýrismannalønir í tilsamans eitt ár, samstundis sum tey hava fingið tingmannaløn. Um hetta skal ber til næstu ferð, landsstýrismaður fer frá, skal tingið taka støðu til í dag*

## Broytingar í landsstýrinum síðani 15. mai 1998

14. desember 1998 fer John Petersen frá sum landsstýrismaður og Jørgen Niclasen tekur við. John Petersen varð valdur tingmaður, men tók ikki sæti á tingi.

28. mars 2000 fer Signar á Brúnni frá sum landsstýrismaður og tekur aftur sæti á tingi. Hann fær landsstýrismannaløn í hálvt ár samstundis sum hann fær tingmannaløn.

14. juni 2001 leggur Tórbjørn Jacbosen frá sum landsstýrismaður. Hann varð ikki valdur á ting

18. august 2000 leggur Finnbogi Arge frá sær sum landsstýrismaður. Hann varð ikki valdur á ting í 1998, men av tí at Bjarni Djurholm loysir hann av sum landsstýrismaður, tekur Finnbogi Arge tí sæti á tingi – og fær bæði landsstýris- og tingmannaløn.

26. februar 2001 fer Helena Dam á Neystabø frá sum landsstýriskvinna. Hon tekur aftur sæti á tingi, og hon fær bæði løgtings- og landsstýrisløn.

Verður lógin ikki broytt, kunnu allir núsitandi landsstýrismenn og løgmaður fáa dupulta løn, verða teir valdir á ting aftur á løgtingsvalinum komandi – um teir altso ikki halda fram í landsstýrinum.

# IRF broytir útberingina av ruskposum

RUSK
*Irf*

Gráu posarnir til rusk, sum skal brennast, verða bornir út tvær ferðir um árið. Hvørt húski fær eina rullu við 26 gráum posum hvørja ferð. Harafturat fær hvørt húski 12 hvítar posar til pappír og papp til alt 2002 og fyrstu mánaðarnar av 2003.

### Gráu posarnir

At vera rusksavnari er hart og stundum ónosligt arbeiðið. Í teimum størru økjunum tekur hvør innsavnari umleið 1000 gráar posar, sum viga góð 11 kg hvør, um vikuna. Harafturat ganga teir minst 40 km um vikuna við einum bundi av posum uppi á sær, soleiðis at teir kunnu leggja ein nýggjan posa eftir seg, har teir hava tikið ein.

IRF arbeiðir við eini ætlan um at betra um arbeiðsumstøðurnar hjá innsavnarunum. Fyrsta stigið er at minka um arbeiðið við at bera tómar posar út til hvørt húski. Hetta verður gjørt á tann hátt, at hvørt húski fær eina rullu við 26 ruskposum tvær ferðir um árið. Fyrra rullan verður borin út í viku 3 í ár og skal hon í einum vanligum húsarhaldi røkka frá og við viku 3 til og við viku 28.

Á posarnar er prentað, at hetta eru posar frá IRF og teir eru til rusk, sum skal brennast. Innsavnararnir taka bert posar, sum eru frá IRF. Ein gráur posi verður tikin frá hvørjum húski um vikuna. Ávís húski kunnu fáa undantak at lata tveir gráar posar um vikuna. Hevur eitt húski meira rusk eina viku enn hóskandi er at lata í ein gráan posa, eigur tað at verða latið á bingjuplássið í kommununi ella at bíða til eina seinni viku.

IRF fer seinni at arbeiða við at fáa flestu ruskstativ til gráu posarnar at standa betur í tráð við tað, sum er fyriskrivað í Reglugerð um ruskinnsavning frá Arbeiðseftirlitinum. Kann hvør av okkum stytta gongdina, sum ruskposarnir skulu berast við t.d. 5 metrum, ber hvør innsavnarari 11 kg einar 5000 metrar stytri hvørja viku ella einar 250 km stytri um árið. Víst verður annars til kunningarsíðurnar fyri mars og apríl í júst útkomna IRF-kalendaranum. Vert er longu nú at kanna eftir, um ruskstativið stendur á hóskandi stað í mun til reglugerðina.

### Hvítu posarnir

Tær komandi vikurnar fær hvørt húski í IRF-kommununum ein stakk við 12 hvítum posum. Ein hvítur posi verður heintaður frá hvørjum húski fimtu hvørja viku, so 12 posar eru til alt 2002 og fyrstu mánaðarnar av 2003.

Byrjað verður at bera posar út í Øki III, Norðoyggjar, í viku 3. Síðani verða posarnir bornir út í Øki IV, Vágar, Sandoy, Nólsoy og Skúgvoy, í viku 4 og Øki V, Suðuroy, í viku 5. Tá eru allar kommunur, sum eru limir í IRF, við í skipanini um endurnýtslu av pappíri. Í viku 6 fáa kommunurnar í Øki I í Eysturoynni og í viku 7 kommunurnar í Øki II í Eysturoynni og Norðstreymoynni nýggjar hvítar posar.

Eisini her verður víst til IRF-kalendaran, kunningarsíðuna innanfyri permuna, og kunninarsíðuna fyri maimánaða.

Tingfundurin í dag:

## Landsstýrislønir og brúkaramál á skránni

TINGFUNDUR
*Eirikur Lindenskov*

Á tingfundinum í dag eru tvey onnur mál til viðgerðar, umframt málið um landsstýrismannalønirnar.

Á skránni er fyrsta viðgerð av uppskotinum hjá Hans Paula Strøm úr Javnaðarflokkinum um løgtingslóg um marknaðarføring. Saman við hesi viðgerð er eisini fyrsta viðgerð av uppskotinum hjá Hans Paula Strøm úr Javnaðarflokkinum um brúkaranevnd. Málini verða viðgjørd undir einum og verða beind í vinnunevndina.

Tingfundurin í dag byrjar klokkan 13:30.